Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Smærugøta 9A,
FR-100 Tórshavn. Tlf.316973. fsn@fsn.fo www.fsn.fo

Tórshavn tann 2023 11 12

Hoyringsskriv

Uppskot til Løgtingslóg um broyting í Løgtingslóg Skattaumskipan 2024 og 2025

Føroya Skipara - & Navigatørfelag (FSN) hevur hesar viðmerkingar:

Vit hava lisið nevnda uppskot

Føroya Skipara-& Navigatørfelag hereftir nevnt (FSN) skal gera vart við, at FSN tekur á ongan hátt undir við nøkrum slag av broytingum av Sjómannafrádrátti ella tilfeingisgjøldum, sum verða trekt av frá skipara við manning.

FSN er av tí fatan, at rættindahavarin/kvotueigarin - rættindahavarar/kvotueigarar, sum eiga og hava rættindi til kvoturnar, eiga at rinda alt veiðiavgjaldið/tilfeingisgjaldið og FSN metir at landið eigur hesa uppgávuna at krevja áðurnevndu eftir hesum peningi.

Viðv Sjómannafrádráttinum, so hevur FSN hesa viðmerking.

Fiskimannafrádráttur

	Frádráttur -14% av:	Kostnaður pr. ár
2024	400.000	4.900
2025	300.000	7.000
Tilsamans		11.900

Nú samgongan ætlar at minka um sjálvan botnfrádráttin í sjómannafrádráttinum sum av fyrstan tíð var 15% av kr. 500.000,- og síðani bleiv broyttur til 14% av kr. 470.000,- og nú aftur skal hann enda á 14% 300.000,- Eftir hesum uppskotinum, so ætlar landi so sannuligani at straffa teir bólkarnar sum hava lægstu inntøkurnar og tað átalar FSN so staðuligani og mæla við frá at hendan broyting kemur í gildið.

FSN vil heita á Føroya Løgting, um at gerða á sama hátt sum eitt nú Norska Stórtingi gjørdi í 2009.
Tá samtyktið Stórtingið at hækka sjómannafrádráttin frá kr. 115.000,- til kr. 150.000,- elle 30% av inntøkuni upp til kr. 150.000,- Hetta verður gjørt fyri at fáa tann Norska sjó/fiskimannin at støðast. Men í Føroyum gerða vit mótsætt.

https://www.stortinget.no/no/Saker-og-publikasjoner/Publikasjoner/Innstillinger/Odelstinget/2008-2009/inno-200809-001/?lvl=0

FAKTA

Vit muga sýggja verðuleikan í eyguni, tað er ringt at manna ein part av fiskiflotanum í dag, og hetta at gerða seg inná tann lægst lønta bólkin kann ikki fara óátalað fram við borðinum.

Avleiðingarnar av hesi broyting verða heilt víst, at fleiri av okkara fiski/sjómonnum finna sær aðrar inntøkumøguleikar, meðan vit fáa enn fleiri 3. Lands arbeiðsmegi og sum vísa nøgdsemið við millum lítið og einki. 60 Indonesar eru á veg til Føroyar at mannað ymisku størvini.
Inntøkan hjá 3. Lands arbeiðsmegini verður mest sum øll send til 3. Lands heimlandi, og hendan keypiorkan blívur burtur úr Føroyska samfelagnum.
Ein onnur avleiðing er, at tilgongdin á eitt nú Vinnuháskúlan "VH" er í støðugari minking, so kunna vit spyrja hví?

FSN vil vísa á at tann Føroyski Fiski / Sjómaðurin rindar í bæði borð, Nú aftur at missa í serstaka sjómannafrádráttinum, økt veiðuavgjøld, øktir brennoljuprísair og fiskaði fiskurin ferð beinleiðis til ein rættindahavara, sum styrir prísi o.ø. So aftur her hevur tann meinigi sjó/fiskimaðurin einki at skula hava at sagt.

Viðv sjúkratrygd

Í føroyum er tað soleiðis, at ein sjó/fiskimaður sum gerst sjúkur og ferð sjúkur/skaddur í land, hann fær 80% av eini arbeiðaraløn á landi í sjúkrapeningi tað svarar til ca kr. 18000,- pr/md.
Hetta svarar absolutt ikki til eitt nú hvat okkara menn fáa sum sigla undir Norskum flaggið

Uttanlandsfrádrátturin

Uttanlandsfrádráttur

	Frádráttur upp til:	Minking í tøkari inntøku pr. ár
2024	96.000	8.400
2025	72.000	8.400
2026	48.000	8.400
2027	24.000	8.400
2028	-	8.400
Tilsamans		42.000

FSN ferð staðuligani at mæla frá broytingum fyri Føroyingar sum starvast uttanlands.
Grundin er tann, at vit sum kallað okkum ein fiskivinnutjóð, hava sannuligani brúk fyri dugnaligum sjó/fiskimonnum, sum altíð kunna venda heim aftur til Føroyar, men ætlaða uppskotið hevur eina neiliga ávirkan á hesum økið.

Avleiðingin er einkul, nú so nógvir Føroyingar siglar við fiskiskipum aðrastaðni enn í Føroyum, so er hetta eitt gott tilfeingi fyri Føroyska samfelagið, at fremmandur valutið kemur inn, men við hesið broyting, so missir samfelagið eisini hesa keypiorkuna og tilfeingið at Føroyingum.

Hvor mye kan du få?

Kopier lenke

Sykepengene skal dekke inntekten du vanligvis har, opp til 711 720 kroner (6 ganger folketrygdens grunnbeløp).
Når NAV skal utbetale sykepenger, fastsetter vi et sykepengegrunnlag som sykepengene regnes ut etter.
Sykepengegrunnlaget kan ikke overstige 6 ganger grunnbeløpet.

Hvis lønnen din er varig endret i løpet av de 3 siste månedene, regnes vanligvis inntekten fra det tidspunktet lønnen ble endret.

Inntekt fra overtid regnes ikke med i sykepengegrunnlaget.

Se hjelp med skattemeldingen for deg som driver med fiske.

Fradrag for fiske og fangst

Du kan ha krav på særskilt fradrag for fiske og fangst hvis du har deltatt aktivt i fiske eller fangst på havet eller langs kysten i minst 130 dager av inntektsåret

Fradraget utgjør 30 prosent av inntekten. Fradraget har en øvre grense på 154 000 kroner.

Det gjelder også fiskere og fangstfolk på utenlandske fiskefartøyer.

Inntekt både som fisker/fangstfolk og sjøfolk om bord på skip i fart – antall døgn om bord

Inntekt både som fisker/fangstfolk og sjøfolk – kombinasjon av særskilt fradrag

Hvis du er fisker

Inntekten din må være minst 59 310 (1/2G)

Hvis du mottar lott, får du beregnet sykepenger etter reglene for selvstendig næringsdrivende. Hvis du har hyre, beregnes sykepengene etter de samme reglene som for arbeidstakere. Hvis du både mottar lott og er på hyre, beregnes sykepengene på grunnlag av begge disse, les mer under avsnittet hvis du har flere jobber.

Hvis du er registrert i fiskermanntallet på blad B, er du omfattet av en kollektiv forsikring som gir rett til sykepenger med 100 prosent dekning fra første sykefraværsdag. Du har rett til sykepenger selv om du har vært i arbeid i mindre enn fire uker.

FAS

FSN fegnast um, at eingin broyting verður gjørd í FAS skipanini

Til síðst.

FSN vil hervið heita á okkara høga Ting, um ikki at broyta skipanir sum virka til fullnar.

Vegna

Føroya Skipara- & Navigatørfelag
Annfinnur Garðalíð, formaður